## Viðtøkur fyri NORÐOYA FORNMINNASAVN

1. Norðoya Fornminnasavn er ein innsavningar- og upplýsingarstovnur fyri norðoyggjar, settur á stovn 9. september 1968. Norðoya Fornminnasavn er sjálvognarstovnur.

2. Endamál savnsins er at innsavna og varðveita alt søguligt tilfar, so sum lutir, skjøl og myndir um lív og virki hjá fólkunum í norðoyggjum.
   Skipa fyri framsýningum og øðrum upplýsandi tiltøkum á øllum økjum.

3. Heimstaðurin er Klaksvík, har savnið í virksemi sínum varðveitir teir gomlu handilsbygningarnar frá einahandilstíðini, samstundis sum hesir bygningar eru karmur um arbeiði savnsins.

4. Stjórn savnsins er nevndin í Norðoya Fornminnafelag.
   Stjórnin tekur avgerðir í øllum stórmálum viðvíkjandi savnsrakstrinum og savnsvirkseminum og setir leiðara at hava dagliga arbeiðið um hendur, samsvarandi tær samtyktir, ið gjørdar eru av stjórnini.
   Roknskaparárið er álmanakkaárið.

5. Allar kommunur í norðoyggjum eru umboðaðar í savninum gjøgnum eitt umboðsráð, sum yvirfyri stjórnini og savninum kunnu reisa síni áhugamál viðvíkjandi savnsvirkseminum.
   Hetta umboðsráð verður valt soleiðis:
   Hvør kommuna í norðoyggjum velur eitt umboð við eykaumboð í ráðið.
   Umboðini verða vald beint eftir, at bygda- og býráðsval hava verið, og sita tey valskeiðið út.
   Umboðsráðið kemur saman til fundar við stjórnini minst eina ferð um árið, har savnsvirksemið í norðoyggjum verður viðgjørt.

6. Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í bygdasavnslógini frá 9. mai 1972 við seinni broytingum.

Soleiðis samtykt á ársaðalfundi felagsins 31. 1. 1989.



# Lógir fyri

# NORÐOYA FORNMINNAFELAG

# Viðtøkur fyri

# NORÐOYA FORNMINNASAVN

# Lógir fyri NORÐOYA FORNMINNAFELAG

1.

Navn felagsins er Norðoya Fornminnafelag. Heimstaður felagsins er í Klaksvík.

2.

Endamál felagsins er at seta á stovn og reka savn fyri fornlutir av øllum slagi, fyrst og fremst av føroyskum uppruna.

Miðað verður ímóti at fáa stór og góð hús í Klaksvík til savnið og samstundis at vissa savninum eitt hóskandi lendi við strondina nærindis bygdini, so at tað har kann hava høvi til at seta upp gomul føroysk hús, so at staðið so við og við skal geva myndina av einari føroyskari bygd í gomlum sniði við øllum tí, sum til seg hoyrdi.

Allir lutir verða merktir og skrásettir við øllum upplýsingum, sum møguligt er at fáa um teir.

3.

Fyri at fremja endamálið skal hetta felag royna at útvega pening til rakstur av savninum, og til sama endamál skal hvør limur rinda eitt ársgjald ella limagjald.

4.

Øll, sum fylt hava 18 ár, kunnu gerast limur í hesum felag.

5.

Limirnir hava skyldu at virka fyri at fremja endamál felagsins. — Allir limir royna at útvega savninum fornlutir.

Limur rindar í tí árinum, hann gerst limur, heilt ársgjald.

Limagjaldið verður kravt inn í januar ársfjórðingi, fyrstu ferð í 1969.

Atkvøðurætt á fundum felagsins hevur limur bert, um hann hevur goldið limagjaldið í rættan tíð.

6.

Stendur limur í eftirstøðu fyri 2 ár, verður hann strikaður sum limur.

7.

Hvør limur hevur eina atkvøðu, sum skal greiðast á fundi.

8.

Roknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember.

9.

Í nevndini eru 5 limir, sum verða valdir á ársaðalfundi fyri 2 ár í senn, soleiðis at tríggir ganga út annað hvørt ár og tveir annað hvørt ár, fyrstu ferð í 1985.

Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og skrivara.

Hesi val fara fram í seinasta lagi 14 dagar, eftir at nevndin er kosin. Fyrst valdi kallar saman til fund.

10.

Formaðurin kallar saman til aðalfund ella til nevndarfund, tá ið hann heldur tað vera neyðugt, og skal kallast til nevndarfund, tá ið minst 2 nevndarlimir krevja slíkan fund.

Formaðurin ber umsorgan fyri, at fundarsamtyktirnar verða skrivaðar í fundarbókina, sum síðani verður undirskrivað av hjástøddum nevndarlimum.

Nevndarfundur er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av nevndarlimunum eru á fundi.

Bókhaldarin ger roknskapin lidnan í so góðari tíð frammanundan ársaðalfundi, at formaðurin kann lata grannskoðararnar fáa roknskapin til kanningar, og heimaverandi nevndarlimir fáa høvi at kanna roknskapin og skriva undir hann.

11.

Formaðurin stjórnar øllum fundum.

12.

Nevndin hevur í varðveitslu øll skjøl og bøkur. Nevndin stendur aðalfundi felagsins til svars.

13.

Aðalfundur er hægsti myndugleiki felagsins. Eykaaðalfundur skal boðast í minsta lagi viku frammanundan. Skráin verður lýst samstundis.

14.

Ársaðalfundur felagsins er í januar mánaða hvørt ár. Fyrstu ferð í 1986.

Hann skal lýsast minst 10 dagar frammanundan við hesari skrá:

1) Formaðurin greiðir frá virki felagsins í farna ári.
2) Limalistin verður framlagdur.
3) Grannskoðaðir roknskapir fyri felagið og savnið verða framlagdir til góðkenningar.
   Rakstrarætlanir fyri felagið og savnið fyri árið verða framlagdar til góðkenningar.
4) Ásetan av limagjaldi.
5) Mál til viðgerðar.
6) Val av nevndarlimum og tveimum eykalimum.
7) Val av 2 grannskoðarum.
8) Ymist.

Vanligur meiriluti eigur avgerðina.

Standa atkvøður á jøvnum, er málið burturdottið á hesum fundi, uttan tá ið tað snýr seg um val av monnum í nevnd. Tá verður lutakast.

15.

Lógir felagsins kunnu broytast á ársaðalfundi, tá ið minst 3/4 av møttum limum atkvøða fyri broyting — líka mikið, hvussu mangir limir, ið eru á fundi.

Verður felagið uppløyst, verður landsantikvarurin at gera av, hvussu ognir felagsins skulu umsitast, til annað felag við sama endamáli verður stovnað í norðoyggjum.

Soleiðis samtykt á ársaðalfundi felagsins 31. 1. 1989.